# Tóku ikki summarklæðini við til Bergen

Hjúnini Roy Smith og Susie Kramer úr USA hava bara gott at bera Bergen sum ferðavinnubýi. - Fólk eiga avgjørt at vitja Bergen, siga tey eftir eina sólríka feriu í næststørsta býnum í Noregi.



**MUST SEE**

*– Bergen er ein býur, sum fólk eiga at vitja, siga tey bæði Roy Smith (68) og Susie Kramer (62)*

Tey vitjaðu í Noregi í tvær vikur eftir at hava keypt sær ein ferðapakka, ið m.a. fevndi um eina ferð við Hurtigruten, ein steðg í Bergen og bátaferðir á norsku firðunum.

Roy og Susie komu til Oslo og fóru síðani til Sognefjørðin og Bergen. Her luttóku tey á fleiri útferðum, m.a. á Bryggen og í søguliga miðbýnum, eins og tey vitjaðu heimið hjá norska tónaskaldinum Edvardi Grieg.

– Vit sigldu á Sognefjørðinum, og tað var eitt ótrúligt upplivilsi at síggja teir mongu stóru fossarnar. Vit vóru sera heppin, tí vit vóru her eftir at kavin var byrjaður at bráðna, og tí vóru fossarnir sera stórir. Noreg er eitt sera vakurt land, siga tey bæði.

Tey halda nógv um norska matin og um norðmenn í heila taki. Tey høvdu fyrireikað seg uppá kalt veður, og høvdu tí nógv heit klæði við, men ikki summarklæði, tí veðrið var sera gott meðan tey steðgaðu her.

– Tað er hugtakandi at síggja vakra landslagið, tí tað er so nógv øðrvísi enn tað hagani vit eru ættað. Ein eigur at vitja Bergen, - tað er ein søguligur, idylliskur og vakur býur, siga Roy Smith og Susie Kramer.

## PAKKAFERÐIR úr Føroyum

**Í summar fer Atlantsflog at flúgva beinleiðis til Bergen. Í hesum sambandi bjóðar flogfelagið pakkaferðir til føroyingar. Prísur fyri henda pakkan er úr 3.705 krónum fyri hvønn, um 4 fólk deila íbúð.**

**Ein ferðin er frá sunnudegi til hósdag; ein er frá hósdegi til sunnudag, og so ein galdandi í 1 viku. Flogið verður hósdag og sunnudag í døgunum 23. juni til 28. august í ár.**

**Millum tey hotellini, sum fólk kunnu búgva á, er Thon Hotel á Bergen Brygge, og sum verður ummælt á síðu 2 í dagsins blaði.**


VANL. 3999,-
3499,-
SPARID 500,-
PISA Koyggjusong
Natúr, við stiga. Uttan madrassu.
90x200 cm. Mát sammansett:
B98,8/130xL209,5xH176 cm



VANL. 49,95
40,-
Ispinnar
6 stk. í pk.


EINANS
149,-
Serveringsskálir
3 stk. í pk.
1 x 20,5x13x2 cm
1 x 26x16x3 cm
1 x 31x20x3,5 cm


EINANS
129,-
Prýðispúta
Fleiri litir
45x45 cm



ÚR 89,95
US - Stólar
Børn 89,95
Vaksin 129,-


VANL. 149,-
125,-
Fleese troyggjur
Reyð ella svørt.
Std. S, M, L & XL

SKEMMAN
STARAVEGUR 7 · POSTSMOGA 3278 · 110 TÓRSHAVN
TEL 31 55 88 · FAX 31 07 09 · SKEMMAN@SKEMMAN.FO